Tíðindaskriv frá Tvøroyrar Kommunu

# Oljuútgerðarhavnin kemur at liggja í Suðuroy



Finnleif Guttesen
*býráðsformaður*

Hetta er staðfest av tí politiska myndugleikanum.

Sjálvt um tað var sum at fáa vátan vøtt frammaná , tá ið tíðindini bórust í Útvarpinum 8. januar 2001, at teir sum høvdu bjóðað seg fram, fyri at fáa eina útgerðarhavn á Drelnesi, ikki sluppu at verða við til at geva tilboð, so ivast vit onga løtu í, at útgerðarhavnin kemur at liggja í Suðuroy.

Hetta er ein greiður politiskur vilji frá Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkinum, og tá ið vit vita, at Javnaðarflokkurin og ein partur av Sambandflokkinum eisini tekur undir við hesum, ja, so er tað einki at ivast í.

Løgmaður, Annfinn Kallsberg, sigur, at politiski myndugleikin hevur elvt til miðsavning og hevur tí eisini ábyrgd til at broyta gongdina og at fólk í størru økjum skulu ikki lata sær lynda ta gongd, sum hevur verið, hetta fara vit sum búleikast á einari útoyggj heldur ikki at góðtaka.

Løgmaður sigur somuleiðis, at málið um útgerðarstøð og tænastur til oljuvinnuna eru mál, sum kunnu geva verandi fyritøkum í útjaðaranum arbeiði og harafturat skapa fleiri nýggjar vinnur, greiðari kann tað ikki sigast.

Varaløgmaður, Høgni Hoydal, sigur, at økismenning er landsmenning, men alt ov lítið hevur verið at sæð til hetta í verki.

Serliga Suðuroyggin hevur merkt at miðstaðarøkið dregur alt meira til sín og hetta er nakað sum teir í Tjóðveldisflokkinum ásanna og virka fyri at broyta.

Somuleiðis setur varaløgmaður spurnartekin við, um miðfyrisitingin nóg greitt umsitir tann politiska boðskapin um økismenning.

Tann politiski myndugleikin, landsstýri, skal ikki geva okkum studning, men geva okkum møguleikan til at vísa, at viljin og áræði á hesari útoyggj, Suðuroy, er til staðar.

At vísa hetta í verki, fáa vit við at oljuútgerðarhavnin verður løgd í Suðuroy, og tað er eingin ivi um, at virkishugurin fer at mennast munandi, soleiðis at Suðuroyggin kemur upp á sama støði sum miðstaðarøki og tá kunnu vit byrja at tosa um at vit hava javnlíkar møguleikar á øllum økjum, men ikki fyrr.

Skulu vit taka verandi samgongu fyri fult, so kann omanfyristandandi ikki sáa nakran iva um, at ein oljuútgerðarhavn skal liggja í Suðuroy, tí hvørki Suðurstreymoy ella Suðureysturoy er nakað útjaðaraøki.

Áhugavert verður at síggja, hvat landstýrismaðurin í oljumálum, Eyðun Eltør, meinar, tá ið hann sigur, at útjaðarin skal vera við í einum oljuleiting.

Tvøroyri, tann 9. januar 2001

---

Bókaútgáva frá Føroya Skúlabókagrunur

# Ábal og aðrar søgur, arbeiðshefti




Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út hefti við arbeiðsuppgávum til søgusavnið Ábal og aðrar søgur, ið er eitt úrval av tekstum eftir Sverra Patursson. Lydia Didriksen hevur lagt arbeiðsheftið til rættis.

Ábal og aðrar søgur, Arbeiðsheftið er ætlað elstu flokkum fólkaskúlans.

Arbeiðsheftið er skipað soleiðis, at fyrst koma spurningar til hvørja søgu sær. Spurningarnir, sum eru flokkaðir eftir torleikastigi í a-, b- og c-spurningar, eru lagaðir soleiðis, at næmingurin ikki bara svarar bókmentaligum spurningum, men eisini fer inn í tekstin og roynir at samstarva við hann.

Fleiri av spurningunum eggja til felags kjak, t.d. at næmingurin skal siga sína hugsan um eitthvørt ella taka støðu. Miðað verður ikki eftir ávísum arbeiðshátti, men kunnu næmingarnir arbeiða hvør sær, í bólkum ella í felag í flokkinum.

Í søgusavninum eru nógvar myndir, sum Tove Askham hevur teknað. Eftir spurningarnar til hvørja einstaka søgu eru spurningar til greining av myndunum í savninum. Spurningarnir eru ikki at fata sum ein frymil til myndagreining sum heild, men heldur sum íblástur til at greina júst hesar myndirnar.

Jens Frederiksen hevur greinað og tulkað eina mynd í søgusavninum sum dømi um, hvussu hetta gerst.

Aftast í bókini eru spurningar um rithøvundin Sverra Patursson og samanberandi spurningar til allar fy´ra søgurnar í savninum.

Prentumsitingina hevur Spf. Gramar á Velbastað havt um hendi. Heftið er prentað hjá Estra í Gøtu.

Ábal og aðrar søgur, Arbeiðshefti er 45 blaðsíður í lítlum broti og kostar 22,-kr.

---

# Fængsel er tryghed for svage

*Finn Wagner,*
*Bredgade 36 B,*
*1260 København K*
*Tlf.: 33323100*

Der er de ubeviste »venner«. Der er faste rammer. I fængslet kan man »være sig selv« uden bøvl og vrøvl.

Vi der aldrig har været i fængsel, forstår det ikke. Alligevel er der en forklaring.

Efter afsoning af en forbrydelse, har samfundet i dag afviklet forbryderens lejlighed, til fordel for ventende, som fx indvandrere og flygtninge. Sådan var det ikke tidligere.

Efter afsoningen skal der skaffes ny bolig og arbejde. Gælden til de offentlige, herunder salær til forsvarer, er i næsten alle tilfælde sekscifret. Børnebidrag fra børn af tidligere ægteskab, skal naturligvis også betales.

Er den prøveløsladte så heldig at få sig et arbejde til fx kr. 200.000 årligt, tager skatten kr. 80.000 + 20% til gammel gæld og 20% til børnebidrag.

Herefter er der cirka kr. 6.000 til rest pr. måned, og som skal dække huslejeindskud, husleje, kost, transport, nyt tøj, og privatforbrug til fx tobak (nær 100% af alle fængslede ryger tobak). Det siger sig selv, at det budget kan ikke holde sammen, og i de fleste tilfælde opnår den løsladte ikke fast arbejde, men må leve af en "lønudbetaling" langt lavere.

Der er altså ikke noget at sige til, at cirka 80% af alle fængslede vender tilbage. Igen og igen til fængslerne. Til trygheden.

De fleste arbejdsgivere er ganske almindelige mennesker, og som gerne giver sociale tabere arbejdstilbud. Langt bedre end offentlige arbejdsgivere, og heldigvis er det en succes i næsten alle tilfælde.

For år tilbage var jeg arbejdsgiver for en særdeles dygtig medarbejder. Han fik en bedre løn end de fleste øvrige ansatte, men begik nye forbrydelser ved at indlogere sig på dyre hoteller i weekender, idet han følte sig ubetydelig og ringe på sit lejede værelse.

Jeg tilbød at betale et betydeligt beløb for hans ulovligheder til diverse hoteller, men han ville hellere have en politisag og efterfølgende fængsel.

Efter ny løsladelse fik han arbejde hos mig igen, men jeg fattede det ikke dengang, og gør det nok heller ikke i dag, at han fortsatte med sine forbrydelser. De nye forbrydelser var som fiktiv selvstændig. Han fik egne lokaler, personale, telefon og leasing af bil. Der var ingen varer, ingen aktiviteter, men han var midtpunkt i en kortere periode. I sær i perioden han havde reception, og hvor bl.a. kommunale pinger mødte frem. Han havde lovet forskellige kommuner fordele ved anlægning af bådepladser til fritidssejlere.

To års fængsel fik han denne gang. Han skrev til mig fra fængslet, at i fængslet havde han trygheden. Aviserne skrev dengang, at det var den elegante forbryder med guldbrillerne, og endda med en akademisk uddannelse. En indbildt uddannelse. Alligevel var han en dygtig, nu tidligere medarbejder. Dygtigere end de fleste.

## Høllin á Stórheyggi 3. og 4. februar 2001!

**Vikuskiftið 3. og 4. februar verður stórt tiltak í høllini á Stórheyggi. Havnar Fimleikafelag skipar millum annað fyri loppumarknaði**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

At savna pening saman er týdningarmikil partur, fyri at skipa fimleikavenjing fyri fimleikarnar í størsta felagnum í Føroyum. Fyrsta vikuskiftið í februar verður partur av tiltakinum loppumarknaður og sóknast Havnar Fimleikafelag tískil eftir »loppum«.

»Loppur« felagið hevur í huga eru: Leikur, búnýti, brúksting, uppskriftir, bøkur, innbúgv og góð klæði.

Tey, ið eiga okkurt at lata verða vinarliga biðin at ringja á tlf. 319327 – so heintar felagið ymsu lutirnar.